# Tvøroyrar Hornorkestur 30 ár

**Tvøroyrar Hornorkestur hevur fleiri konsertir næstu dagarnar og er eisini vertur fyri árligu hornorkesturstevnuni**

HORNORKESTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað eru 30 ár síðani, at Tvøroyrar Hornorkestur varð sett á stovn. Í hesum sambandi hevur orkestrið jubileumskonsert á sonevnda Seglhúsloftinum hjá Thomsen hósdagin klokkan 19:00. Hetta er samstundis fyrsta tiltak í hølunum, sum sunnudagin ament lata upp sum ungdómshús á Tvøroyri. Á skránni er hornblástur, men eisini verður teldusýndar myndir, ið lýsa tíðina, ið Tvøroyrar Hornorkestur hevur virkað. Eisini eru nøkur gomul ljóðføri, ið verða sýnd fram.

Fríggjadagin klokkan 14:00 hava næmingar og ungdómsorkestur konsert í ítróttarhøllini íTrongisvági og leygardagin klokkan 14:00 setur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, árligu hornorkesturstevnuna, og hetta er í Ítróttarhøllini í Trongisvági.



*Tvøroyrar Hornorkestur hevur fleiri konsertir næstu dagarnar og er eisini vertur fyri árligu hornorkesturstevnuni. Her venur orkestrið*
*Mynd: Dagfinn Olsen*





## Starvsfólk til tøknideildina á Kall

**Vilt tú nýta tíni tøkniligu og analytisku evni í eini spennandi og skjótt vaksandi fyritøku, so bjóðar Kall tær vælkomnum á tøknideild sína.**

Við starvinum fært tú rætta løn, eins og vit geva tær sera góðar møguleikar fyri sjálvsmenning. Tað týdningarmesta fyri okkum er nevniliga ikki, at tú dugir alt frá fyrsta degi, men at tú hevur gott næmi og tøkniligan og analytiskan sans.

Starvsøkið
Starvið kann vera rættiliga fjølbroytt, men ein týðandi partur er at røkja tøkniliga støðið undir roknskaparhaldi okkara. Tú fert t.d. at arbeiða við avrokningarskipanum sum Oracle, PostgreSQL, Bercut og Navision, tú fert at avgreiða og menna hagtalsrapportir (SQL-fyrispurningar), fyrireika dátugrundarlag til roknskapin og at betra um arbeiðsgongdir okkara.

Útbúgving og eginleikar
Tað er sjálvandi ein fyrimunur, um tú ert t.d. teldustøðingur, datanomur, verkfrøðingur ella HA'ari, men hevur tú fingið tín lærdóm av egnum royndum, so ert tú hjartaliga vælkomin at søkja – tí vit vilja fyrst og fremst hava fólk við røttu evnunum.

Tað er eisini sera umráðandi, at tú hevur góðan hug at læra, ert fleksibul, dugir at samstarva og hevur áhuga fyri at betra um viðkomandi arbeiðsgongdir.

Umsóknir
Hevur tú hug at søkja starvið, send so eitt teldubræv við avritum av viðkomandi skjølum til Hans Poulsen á Kall, hp@kall.fo. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú eisini vælkomin at ringja til Hans á 502072.

Umsóknarfreistin er 18. apríl klokkan 12:00.

Um Kall
Kall kom á marknaðin í apríl 2001 og hevur síðan ment seg til ein virknan leikara í fjarskiftismenninginum í Føroyum. Vit eru nú 35 fólk og selja fyri um 100 mió. kr. árliga. Kall er partur av samtaki, sum er skrásett á partabrævamarknaðinum OMX.

kall
20 20 20

SENDISTOVAN